Tjóðskjalasavnið

# Stutt og greitt um avhending av kt-skipanum

## Hvat skal avhendast Tjóðskjalasavninum?

Allir stovnar skulu boða Tjóðskjalasavninum frá, áðrenn tey taka nýggjar kt-skipanir í nýtslu. Tjóðskjalasavnið metir um – út frá fráboðani, um avhendast skal eitt avrit til savnið, og hvussu og nær avhendast skal fyrstu ferð. Hetta verður avgjørt í eini áseting um varðveiting. Síðani, tá ið avhendingin skal fara fram, seta vit okkum í samband við tykkum.

### Hvat er ein kt-skjalasavnsútgáva?

Ein kt-skjalasavnsútgáva er eitt avrit av dátum frá eini kt-skipan hjá einum stovni við upplýsingum um skipanina og fílur, sum lýsa hvussu dáturnar hanga saman. Skjalasavnsútgávan skal gerast í ávísum formatum, fyri at hon kann varðveitast fyri eftirtíðina ella til framtíðarnýtslu?
Tjóðskjalasavnið ásetur formatsnið í eini kunngerð ella rundskrivi.
Myndilin niðanfyri vísir partarnar í eini skjalasavnsútgávu.



Tjóðskjalasavnið

## Hvat er uppgávan hjá myndugleikanum?

Uppgávan hjá myndugleikanum er, at:

- Góðskutryggja skipanina áðrenn avhending. Til dømis við at syrgja fyri, at skipanin ikki manglar dátur og at møgulig, ella viðkomandi skjøl eru knýtt at málum. Góðskutryggingin kann vera tíðarkrevjandi. Tað er av týdningi, at tit seta tað neyðuga tilfeingið/peningin av til uppgávuna.
- Syrgja fyri, at fyrisitingarliga skjalfestingin av skipanini er dagførd, og at tað finst ein teknisk skjalfesting av uppbyggingini av skipanini v.m.
- Framleiða skjalasavnsútgávu av teimum kt-skipanum, sum Tjóðskjalasavnið hevur gjørt av at varðveita.

## Hvør framleiðir skjalasavnsútgávuna?

Tit kunnu fáa ein veitara uttanífrá til at gera ella avgreiða tann tekniska partin av uppgávuni, ella tykkara egnu kt-deild. Kt-veitarin ella deildin skal avhenda eina tekniska skjalfesting av kt-skipanini, draga út dátur úr kt-skipanini, syrgja fyri at formbroyta til røttu formatini og samla dátur og skjalfesting til eina skjalasavnsútgávu.

## Hvør skal gjalda?

Stovnurin ella myndugleikin skal sjálvur gjalda fyri útreiðslurnar, ið eru knýttar at avhendingini av kt-skipanini. Tjóðskjalasavnið arbeiðir upp á at gera avhendingina so lætta og smidliga sum møguligt og at fáa kostnaðin niður. Tit kunnu stuðla hesum arbeiði við at senda okkum upplýsingar um kostnað og tíðarnýtslu í sambandi við avhending av kt-skipanini til Tjóðskjalasavnið. Hetta verða tit biðin um, tá ið vit senda tykkum endaligu góðkenningina av skjalasavnsútgávuni.

## Hvussu er avhendingarmannagongdin?

- Tjóðskjalasavnið sendir hvørt ár eitt rundskriv um tær kt-skipanir, sum skulu avhenda dátur til Tjóðskjalasavnið. Hetta gevur møguleika fyri at taka hædd fyri kostnaðinum.
- Vit innleiða eitt avhendingarmál við at skriva til tykkum.
- Vit hava fund við tykkum og røða um dátuinnihald og skjalfesting av skjalasavnsútgávuni. Á fundinum avtala partarnir eina tíðarætlan.
- Vit flýggja út eina avhendanaráseting, ið ásetur innihaldið í skjalasavnsútgávuni og avhendingardagfesting.
- Tit senda okkum skjalfesting til góðkenning.
- Tit taka út dátur frá skipanini og framleiða eina skjalasavnsútgávu, møguliga við hjálp frá kt-veitara.
- Tit ella tykkara kt-veitari testa eina skjalasavnsútgávu við testforritinum ADA.
- Tit lata skjalasavnsútgávuna inn til Tjóðskjalasavnið – antin persónliga ella við at senda hana sum innskrivað sending.
- Vit kvitta fyri avhendingina.
- Vit testa skjalasavnsútgávuna og góðkenna hana, tá allar ásetingar eru hildnar.

Tjóðskjalasavnið

## Aftaná eina avhending

Skjalasavnslógin ásetur reglur um, at dátur frá kt-skipanum eru almennt atkomuligar eftir 30 árum eftir seinastu skráseting í skipanini. Inniheldur skjalasavnsútgávan persónsupplýsingar, er hon almenn atkomulig eftir 80 ár.

Á heimasíðuni hjá Tjóðskjalasavninum kanst tú lesa meira um, nær og undir hvørjum treytum ein kann fáa atgongd til tær dátur, sum tit hava avhenda. Her finnur tú eisini eitt yvirlit yvir, hvørjir stovnar skulu avhenda teirra kt-skipanir komandi árini.

## Hví skulu vit varðveita á skjalasavni?

Tað er neyðugt at skjalprógva arbeiðið hjá fyrisitingini, soleiðis at komandi ættarlið kunnu skriva og skilja teirra søgu. Tjóðskjalasavnið tryggjar ta talgildu og fysisku atkomuna til skjalprógvingina av Føroya søgu.

Rættargrundarlagið fyri savnindini er skjalasavnslógin, kunngerðir og rundskriv, sum finnast á heimasíðuni hjá Tjóðskjalasavninum og í lógarsavninum.